## Einfaldur feilur kostaði 154 mannalív



Tað var ein feilur í veingjunum, sum var skuldin til flogvanlukkuna í Madrid í síðsta mánaði, sum kostaði 154 menniskjum í Spanair-flogfarinum lívið. Flapsini á veingjunum vóru ikki sligin nøktandi út, tá flogfarið læti sær, og tað verður nú hildið, at hetta var orsøkin til ógvusligu vanlukkuna 20. august. Tað var tann nú deyði flogskiparin, sum átti suldina, sambært tíðindastovuni AP. Eitt hart ljóð skuldi havt ávarað flogskipararnar um, at flapsini á veingjunum ikki vóru heilt úti, og tí hevði flogfarið ikki nóg nógva uppdrift at sleppa á flog. Kanningar hava nú staðfest, at tað var skeiva støðan hjá flapsunum ið gjørdi, at flogfarið ikki slapp á flog. Áður hevur verið talan um, at tað var ein feilur í øðrum av motorunum sum var skul í, at flogfarið datt niður, men kanningar hava víst, at einki var í vegin við teimum, og at tað sum nevnt vóru flapsini, sum ikki vóru nóg langt úti. 154 fólk mistu lívið, meðan bert 18 sluppu frá vanlukkuni við lívinum, skrivar tíðindastovan AP.

# Kapping um bestu kærleikssøgu

**Bókadeildin skipar nú fyri kapping um bestu stuttsøgu fyri ung, har kærleiki er høvuðsevni í søguni**

STUTTSØGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

1. desember er evstamark at lata inn stuttsøgu í norðurlendskari kapping um bestu kærleiksstuttsøgu fyri ung, har møguleiki er at vinna 12.000 kr.

Hepnu vinnarasøgurnar verða givnar út í spildurnýggjum stuttsøgusavni, sum kemur út á heysti í 2009 í øllum Norðurlondum.

Í Føroyum er tað Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum er partur av norðurlendska forlagssamstarvinum, ið skipar fyri kappingini í samstarvi við Eik Banka

### Felags átak

Í sambandi við kappingina vísir Bókadeildin á, at vit seinastu árini javnan hava gramt okkum um, at ov lítið verður skrivað av upprunaføroyskum nútíðarligum tilfari til ung. Hetta er torførur bólkur at skriva til, tí alt er so skiftandi og broytist so skjótt í ungdómsárunum, kanska ongantíð so skjótt sum nú. Hetta er ikki bara galdandi í Føroyum, og tí hava forløg úr øllum norðurlendsku máløkjunum í felag tikið stig til kappingina og útgávuna.

Endamálið er í fyrstu syftu at fáa til vega tvær nýggjar, føroyskar stuttsøgur til ung, sum skulu við í nevnda norðurlendska stuttsøgusavnið til ung. Í savninum verða átta norðurlendsk forløg úr átta ymiskum máløkjum umboðað við einari ella tveimum stuttsøgum hvørt. Um so er, at kappingin fær góða undirtøku, fer Bókadeildin møguliga at geva út eitt savn afturat við bara upprunaføroyskum tilfari til ung.

### Treytir

Fyri at luttkaka í kappingini skal søgan vera til ung og fylla í mesta lagi 15.000 tekn. Harumframt skal søgan fara fram í okkara samtíð og hava kærleika sum høvuðsevni.

Virðislønir á 12.000 kr verða latnar einum ella tveimum vinnarum. Eik Banki letur vinningarnar. Bókmentaliga nevnd Føroya Lærarafelags er dómsnevnd og tilskilar sær rætt til onga virðisløn at lata, um ikki verður hildið, at nøkur søga er virðislønarverd.

Handritini skulu verða Bókadeild Føroya Lærarafelags í hendi í seinasta lagi mánamorgunin 1. desember kl. 9.00. Handritini skulu latast inn í afturlatnum brævbjálva, uttan at navn verður tilskilað. Høvundurin skrivar navn og bústað sín í øðrum afturlatnum brævbjálva, ið skal fylgja við handritinum.

### Skeið í skriving

Í sambandi við kappingina er ætlanin at skipa fyri skeiði í Havn í døgunum 6.til 9. februar 2009, har allir høvundar, ið verða tiknir við í útgávuna, skulu hittast saman við forleggjarum og fakfólki. Á skeiðnum fer lærari á rithøvundaskúla at halda fyrilestrar um ungdómsskaldskap, og einstøku søgurnar verða viðgjørdar og betraðar í bólkum. Hetta verður eitt gott høvi hjá skrivandi fólki at hittast og fáa íblástur og kunning um at skriva.

Bókin verður ætlandi givin út á heysti 2009. Allar søgurnar verða týddar til ymsu málini, og hon kemur út í øllum londunum samstundis. Hini forløgini eru: Milik í Grønlandi, Forlagið í Íslandi, Phabel í Danmark, Samlaget í Noregi, Davvij Girji í Sámalandi, Berghs Förlag í Svøríki og Tammi í Finnlandi.



*Kærleiki evnið í nýggjari norðurlendskari kapping um at skriva stuttsøgur til ung*

# Bókasavnsvika um Norðurlond

**»Alskurin til Norðurlond« er heitið á norðurlendsku bókasavnsvikuni, sum verður í november**

BÓKMENTIR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tólvta árið á rað skipa www.fnf.se Norrønu feløgini og www.bibliotek.org/" Bókasøvn í Norðurlondum fyri norðurlendskari bókasavnsviku. Tiltakið fer fram í døgunum 10. til 16. novemberundiryvirskriftini ”Kärlek till Norden”, ella "Alskurin til Norðurlond". Undir hesum tema er ætlanin gjøgnum bókmentir at lýsa samband norðbúgva við lond síni, og Norðurlond sum stað í heiminum.

### Upplestur

Felags fyri Norðurlond eru myrku vetrarkvøldini, har tað fyrr í tíðini var vanligt at savnast og siga søgur. Hetta hevur eisini givið íblástur til upplestrardagin, ið er fastur táttur á norðurlendsku bókasavnsvikuni. Í ár verður stóri upplestradagurin mánadagin 10. november, fyri børn kl. 9.00 og fyri tey vaksnu kl. 19.00. Hesar tíðir verður lisið upp samstundis í øllum londum, sum eru við.

Høvuðsanavnið fyri tey vaksnu er í ár Eeva Kilpi úr Finlandi, sum hevur skrivað ein nýggjan tekst til tiltakið. Fyri børnini er tað Guðrún Helgadóttir úr íslandi og bókin Gandakellingin Flumbra. Aðrar søgur, sum verða at hoyra hjá børnunum, eru eftir høvundarnar Manu Sareen úr Danmark, Klaus Hagerup úr Norra, Virpi Saarinen úr Finlandi, Yrsa Sigurðardóttir úr Íslandi, Ann-Helén Laestadius úr Svøríki, Ólavur Michelsen úr Føroyum, Johanne Platous úr Grønlandi og Risten Sokki úr Sámalandi.

Norðurlendska bókasavnsvikan, sum eisini hevur heitið "Í skýming", er vorðin ein av heimsins størstu tiltøkum við upplestri. Í fjør luttóku ikki færri enn 2.600 stovnar - bókasøvn, skúlar og felagsskapir - úr átta londum.



*Finski rithøvundurin Eeva Kilpi hevur skrivað eina nýggja søgu til norðurlendsku bókasavnsvikuna í ár*